Veðurstøðirnar boða nú frá koyrilíkindum

# – Landsverk tekur nýggja tø

**VETRARHALD: Vetrarfundurin, har øll starvsfólk hjá Landsverki í vetrarhaldinum hittast fyri at brynja seg til arbeiðið í vetrarhálvuni, er júst farin aftur um bak. Høvuðsevnið á fundinum hesaferð var umskipan og uppstiging av vetrarhaldinum**




KOYRILÍKINDI
*Tíðindaskriv frá Landsverki*

Koyrilíkindini frá Landsverki eru eftirhondini so undir húðini á Føroya fólki, at tað næstan kann samanberast við kvøðuljómarnar ella klassiska tónleikin fyri middag. Men nú verður fráboðanin um koyrilíkindir broytt og fer at ljóða og virka øðrvísi. Orsøkin til broytingina er, at koyrilíkindini nú stavabeinleiðis frá veðurstøðum, sum Landsverk hevur sett upp kring landið.

## Neyvari koyrilíkindir allan sólarringin

Møguleikarnir at fáa koyrilíkindini ella upplýsingar um veðrið frá Landsverki gerast alsamt fleiri, og er hetta ein natúrlig gongd, nú vit skjótt seta fótin inn í ár 2010. Í dag fært tú upplýsingar um koyrilíkindini frá Landsverki umvegis fleiri ymiskar miðlar, t.d. av heimasíðuni landsverk.fo, í útvarpinum, beinleiðis í fartelefonina umvegis sms ella wap-tænastuna hjá Landsverki.

Upplýsingarnir um koyrilíkindini, sum verða varpaðir út gjøg- num hesar ymsu miðlar, stava nú frá veðurstøðunum hjá Landsverki kring landið. Gamla skipanin hevur virkað væl øll árini, men er vetrarhaldið komið til enn eitt vegamót, har tøknin bjóðar av. Fleiri slík vegamót hava verið í vetrarhaldssøguni hjá Landsverki. Til dømis vóru fráboðanir um koyrilíkindi frammanundan vetrinum 1978/79 meiri tilvildarligar. Veturin 1978/79 var ein serliga ringur vetur, og vuksu krøvini til fráboðan um koyrilíkindi hendan veturin so mikið, at neyðugt var at fáa í lag eina meira miðvísa fráboðanartænastu um koyrilíkindi. Tá gjørdist tað møguligt hjá øllum fyri fyrstu ferð at ringja á høvuðsskrivstovuna á Landsverki, har ein telefonsvarari segði frá, hvussu koyrilíkindini vóru. Hetta var eitt stórt framstig tá.

Síðan tann veturin hevur vetrarhaldið á Landsverki arbeitt soleiðis, at vegmenn 3 ferðir um dagin hava koyrt vegastrekkini ígjøgnum, og hava mett um líkindini at koyra. Upplýsingarnar hava verið savnaðar saman á høvuðsskrivstovuni, sum so aftur hevur sent boðini víðari til útvarp, telefonsvarara og seinnu árini eisini til tekstvarp, heimasíðu og sms-skipan. Nú er so alt hetta broytt aftur – bæði tað operativa vetrarhaldið og sjálv fráboðanartænastan, sum nú varpar upplýsingar út beinleiðis frá veðurstøðum kring landið.

## Ísbilur fann kaldastu vegastrekkini

Veðurstøðirnar eru ikki settar á tilvildarligum støðum. Landsverk hevur sett veðurstøðir á teimum støðum, har frost fyrst legst á koyribreytina, tá broytingar eru í veðrinum. Kaldastu vegastrekkini eru funnin við einum sonevndum ísbili, sum er útgjørdur



